# Avtala um javnbjóðis samstarv
millum
# kommunurnar í Norðoyggjum
í
# "Norðoya Bú- og Heimatænastu"

## § 1
## Heimild

Henda samstarvsavtala er gjørd við heimild og støði í niðanfyri nevndu løgtingslógum:

LL nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
LL nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
LL nr. 31 frá 14. apríl 2014 um ávís starvsfólkaviðurskifti, tá heimatænastan, eldrarøktin v.m. verður løgd til kommunur at umsita.

## § 2
## Samstarvsøki og luttakandi kommunur

Samstarvsavtalan er millum allar kommunurnar í Norðoyggjum, sum eru niðanfyrinevndu:

- Fugloyar Kommuna
- Viðareiðis Kommuna
- Hvannasunds Kommuna
- Kunoyar Kommuna
- Húsa Kommuna
- Klaksvíkar Kommuna

## § 3
## Endamál

Vísandi til LL nr. 19 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er endamálið við hesum samstarvi at líkastilla allar kommunurnar í Norðoyggjum og allar teirra borgarar í mun til tænasturnar innan eldraøkið.

## § 4
## Heitið

Samstarvið hevur heitið: "Norðoya Bú- og Heimatænasta".

## § 5
## Stýri

Leiðslan fyri samstarvið er eitt stýri, sum luttakandi kommunurnar – sambært § 7, stk. 1-4, og § 11 í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldraøkið v.m.– fyrstu ferð velja sum skjótast eftir, at samstarvið er góðkent av landsstýrismanninum og annars eftir hvørt kommunuval, galdandi fyri valskeiðið.

Stk. 2: Stýrið velur sjálvt formann og næstformann. Ein av borgarstjórunum í samstarvinum skal vera formaður.

Stk. 3: Hvønn ársfjórðing hevur stýrið regluligar fundir, sum verða ásettir av stýrinum fyri eitt ár í senn. Harumframt kann stýrið samtykkja at hava eyka fundir eftir tørvi.

Stk. 4: Vanligur meiriluti er galdandi. Miðað verður ímóti, at avgerðir hjá stýrinum verða tiknar í semju.

Stk. 5: Leiðarin fyri samstarvið er skrivari hjá stýrinum ella útvegar annan skrivara. Skrivarin hevur ikki atkvøðurætt.

Stk. 6: Stýrislimir fáa samsýning sambært § 7, stk. 5, í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

## § 6
## Avgerðarrættur og setanarmyndugleiki

Stýrið hevur evstu ábyrgd og harvið avgerðarrættin og setanarmyndugleikan á økinum heimatænasta, eldrarøkt v.m. og tekur avgerðir vegna kommunurnar í samstarvsøkinum.

Stk. 2: Stýrið ger eina starvsskipan, sum útgreinar heimildir hjá leiðslu og umsiting á hesum økjum.

## § 7
## Leiðsla og umsiting

Stýrið setur og loysir úr starvi leiðara fyri samstarvið.

Stk. 2: Stýrið samtykkir nærri starvsskipan fyri arbeiðið hjá leiðslu og umsiting, sum hava fakligu, fíggjarligu, starvsfólkaligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av virkseminum hjá samstarvinum við tilvísing til stýrið.

Stk. 3: Umsitingarliga er leiðarin ein samskipaður partur av umsitingini hjá Klaksvíkar Kommunu, sum veitir allar neyðugar leiðsluligar/umsitingarligar tænastur til samstarvið.

Stk. 4: Leiðsluligu og umsitingarligu tænasturnar verða veittar samstarvinum ímóti einum føstum árligum gjaldi, sum sambært avtalu millum stýrið og Klaksvíkar Kommunu verður regulerað eina ferð um árið í sambandi við fíggjarætlanina.

## § 8
## Leiðslubygnaður – skipan

Leiðsla og ábyrgd av Norðoya Bú- og Heimatænastu – fíggjarliga, umsitingarliga, starvsfólkaliga og tænastuliga – er sambært niðanfyri standandi leiðslubygnaði:

(1) Stýrið – valt av luttakandi kommunum.
(2) Stýrisformaðurin – valdur av stýrinum
(3) Leiðsla og umsiting – sambært § 6

Fyrsta uppgávan hjá stýrisformanni og leiðslu verður at endurskoða verandi bygnað fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu og eldraøkið og koma við einum tilmæli til stýrið um møguligar broytingar av bygnaði.

## § 9
## Visitatión/upptøka

Til at visitera brúkararnar av tænastunum frá samstarvinum, herundir at taka avgerð um upptøku í eldrasambýli, ellis- og røktarheim, setur leiðarin ein visitator fyri alt samstarvsøkið.

Stk. 2: Allar týðandi avgerðir hjá visitator verða tiknar í samráð við leiðaran fyri samstarvið.

Stk. 3: Avgerðir um upptøku verða somuleiðis tiknar í hóskandi samráð við viðkomandi deildarleiðara.

Stk. 4: Umsóknir verða sendar umsitingini, har móttøkan er Miðlan í býráðshúsinum.

Stk. 5: Visitator ger eina skrivliga tørvsmeting av røktartørvinum hjá viðkomandi umsøkjara.

Stk. 6: Allir borgarar í samstarvsøkinum, sum lúka treytirnar fyri upptøku, hava sama rætt til upptøku og tænastur frá samstarvinum.

Stk. 7: Í heilt serligum førum kunnu fólk, sum ikki eru fastbúgvandi í upptøkuøkinum, fáa umlætting ella búpláss, um pláss er tøkt, og tey annars lúka upptøkutreytirnar.

Stk. 8: Flytur persónur, sum ikki hevur bústað í samstarvsøkinum, inn á sambýli, ellis- ella røktarheim, skal avvarðandi samstarvsøki skrivliga vátta at gjalda partvíst til útreiðslurnar av húsinum. Gjaldið verður ásett av stýrinum við støði í viðkomandi útreiðslum og fráboðað viðkomandi samstarvi.

Stk. 9: Stýrið ásetur nærri reglur og mannagongdir fyri visitatión/upptøku.

## § 10
## Útreiðslubýtið millum kommunurnar

Fyri tær tænastur, sum hetta samstarv veitir brúkarunum í samstarvsøkinum, rindar hvør kommuna í mun til talið av borgarum, sum 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri. Hetta sambært § 10 í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

## § 11
## Fíggjarætlan – viðgerð v.m.

Stk. 1: Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember.

Stk. 2: Áðrenn 1. september skal formaðurin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri stýrið samsvarandi § 7, stk. 7, í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Stk. 3: Stýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir. 1. viðgerð skal verða áðrenn 1. oktober, soleiðis at avleidda gjaldið hjá kommununum í samstarvinum kann takast við í fíggjarætlanarviðgerð teirra.

Stk. 4: Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt skjótast til ber aftaná, at kommunurnar í samstarvinum hava samtykt sínar fíggjarætlanir.

Stk. 5: Samstarvið kann ikki átaka sær nakra útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð av eykajáttanini hjá samstarvinum.

Stk. 6: Fyrst komandi 1. september í hvørjum kommunuvalskeiði leggur stýrið eina dagførda langtíðarætlan fyri heimatænastu, eldrarøkt v.m. fyri komandi 4 árini, sum verður send samstarvskommununum til hoyringar saman við fíggjarætlanini. Langtíðarætlanin verður fylgd upp árliga í sambandi við fíggjarætlanarviðgerðina.

Stk. 7: Samstarvið hevur sjálvstøðugan roknskap sambært ásetingunum í kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununanna o.tíl.

## § 12
## Grannskoðan og regulering

Í seinasta lagi í apríl mánað skal grannskoðaður ársroknskapur fyri árið frammanundan fyriliggja, og verður gjaldið frá kommununum fyri farna árið tá regulerað samsvarandi endaligu tølunum.

## § 13
## Hvussu íløgur verða skipaðar

Tað er stýrið fyri Norðoya Bú- og Heimatænastu, sum ger íløguraðfestingar. Fyri at fremja íløgur, skulu í minsta lagi 2/3 av stýrinum vera fyri ætlanini.

Stk. 2: Kommunurnar í samstarvinum eru samdar um, at tær í felag umvegis hetta samstarv, lutfalsliga eftir talinum av borgarum, sum eru 67 ár og eldri, skulu ognast og rinda fyri ellis-, røktarheimini og sambýlini í samstarvinum og soleiðis rinda javnbjóðis fyri bæði gjørdar íløgur og árliga raksturin. Sí eisini § 11.

Stk. 3: Ognirnar hjá landi og sjálvsognarstovnum, sum eru partur av hesum málsøki í samstarvsøkinum, verða yvirtiknar av samstarvinum.

Stk. 4: Ognirnar hjá Klaksvíkar Kommunu innan málsøkið, verða yvirtiknar av samstarvinum, og fær kommunan endurgoldið sín part av gjørdu íløgunum.

## § 14
## Á hvønn hátt eftirlit verður skipað

Eftirlitið verður skipað í millumkommunalum samstarvi eftir kunngerð samb. LL 19 § 19, stk. 3

# Avtala um javnbjóðis samstarv
millum
# kommunurnar í Norðoyggjum
í
# "Norðoya Bú- og Heimatænastu"

**§ 15**
**Gildiskoma**

Henda samstarvsavtala fær gildi, tá ið hon er samtykt av luttakandi kommununum, og landsstýrismaðurin hevur góðkent hana.

Stk. 2: Broytingar av samstarvsavtaluni skulu somuleiðis góðkennast av kommununum í samstarvinum og av landsstýrismanninum.

*Klaksvík, 20. juni 2014*

| **Hvannasunds Kommuna** | **Klaksvíkar Kommuna** | **Kunoyar Kommuna** |
|---|---|---|
| *Katrin Næs*<br>*borgarstjóri* | *Jógvan Skorheim*<br>*borgarstjóri* | *Meiken S. Michaelsen*<br>*borgarstjóri* |
| **Viðareiðis Kommuna** | **Húsa Kommuna** | **Fugloyar Kommuna** |
| *Hans J. Kallsberg*<br>*borgarstjóri* | *Magni Garðalíð*<br>*borgarstjóri* | *Amalia í Frammistovu*<br>*borgarstjóri* |